## Amager fekk av at vita

Tað var ikki við mýkindum, at Viborg vitjaði hjá FC Amager í donsku 1. deild um vikuskiftið. FC Amager hevur annars fingið eina væl og virðiliga góðkenda byrjan upp á tilveruna, men sunnudagin gjørdist talan um sannan bank. Ikki minni enn 7-1 vann Viborg. Støðan í hálvleikinum var 2-0 til, men eftir steðgin gekk skjótt. Klokkan var bara komin upp á 68 minuttir, tá 1-7 stóð á máltalvuni, og hóast Viborg eftir hetta setti ferðina niður, so mundu tey flestu av heimaáskoðarunum tá vera farin heim.

## Ramos leingist heim

Enska blaðið Sunday People vil verða við, at spanski venjarin hjá Tottenham, Juande Ramos, leingist heim, og tí er framtíðin hjá venjaranum í Tottenham í iva. Tað sigst verða vánaliga enska veðrið, málið og tann øðrvísi maturin sum gera, at Ramos ikki strívist í London. At úrslitini heldur ikki hava verið til vildar higartil í hesum kappingarárinum, hevur neyvan gjørt støðuna betur.



*KÍ kvinnur føroyameistarar 2008. Aftan frá vinstru: Olga Fríðunn Olsen, Paula Mikkelsen, Marjun Joensen, Adelheid Olsen, Olga Kristina Hansen, Tove Sólheyg, Ragna Patawary, Elsa Maria Simonsen og Alexander Djordjevic, venjari. Framman frá vinstru: Malene Josephsen, Ann Olsen, Sigrid Jacobsen, Vár-Jenny Lydersen, Ása K. Thomsen, Sølva Andreasen, Rannvá Andreasen og Doris í Garði*

*Mynd: Norðlýsið*

# Celtic, Dynamo Kiev og KÍ

**Níggjunda ári á rað endaði FM-steypið í Klaksvík. Kvinnurnar hjá KÍ verða ikki tiknar í Føroyum, og nú verða avrikini sett í mun til drúgvu meistararøðirnar hjá útlendskum stórfeløgum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eingin yvir og eingin við síðuna av. Tað má vera niðurstøðan, tá tosast skal um fótbóltsavrikini hjá KÍ-kvinnunum.

Heldur ikki í 2008 eydnaðist nøkrum øðrum liði at standa teimum kurl, og leygardagin kundu tær so aftur lata seg krýna sum meistarar.

Mótstøðan á degnum kom av Skála, men hóast hesar hildu KÍ frá fatinum fyrstu trý korterini, so var tað ikki nóg mikið. Eftir steðgin settu gyltu kvinnurnar nevnliga trumf á, soleiðis at talan gjørdist um sannførandi 4-1 sigur.

Kvinnurnar høvdu á degnum pyntað seg í gyltar KÍ-búnar, og fagnaðurin var sjálvandi stórur, tá Malena Josephsen at enda kundi taka ímóti stóra steypinum, sum enn einaferð er ogn hjá KÍ. At menninir hjá felagnum dagin eftir skuldu spæla tað, sum líktist lagnudysti, løgdu tey í Klaksvík ikki so nógv í hendan dagin, tí á kvinnufrontinum er eingin, sum kemur í nær námind siðvenjuni hjá Klaksvík.

### AB vann silvur

Bert ein annar dystur varð avgreiddur leygardagin. Á Argjum vann AB 2-1 á B36, og við hesum tryggjaði AB sær silvurið, samstundis sum B36-kvinnurnar stóðu í teirri óvandu støðu, at landskappngini ikki gav teimum nakað heiðursmerki.

Bronsuna kundi Víkingur taka sær av uttan at spæla. Tær skuldu av røttum spælt í Vági, men trupulleikar við Smyrli bóru við sær, at tann dysturin varð av ongum. Á pappírinum hevur hesin dystur ongan týdning, og tí er í løtuni ógreitt, um dysturin yvir høvur verður avgreiddur, ella um hann sleppur at fara í gloymskuna.



*Bæði hattar og troyggjur høvdu gyltar litir, tá KÍ-kvinnurnar níggjunda árið á rað kundu skrúva propparnar av sjampanjuni*

*Mynd: Norðlýsið*

## Gunnar Dahl-Olsen aftur á toppinum

**Talan var um mest sum ótolandi umstøður, tá veteranurin, Gunnar Dahl-Olsen enn einaferð vann sær FM-heitið í landavegssúkkling**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Tað var sera vánaligt veður leygardagin, tískil var tað ikki serliga hugaligt at byrja kappingina. Men á Toftum, har kappingin byrjaði, var veðrið so mikið hampuligt, at gjørt var av at byrja kappingina.

Undirtøkan til kappingina, sum vanliga er um 10 til 15 luttakarar, var sera vánalig. Bert fýra súkklarar vóru við. Hinvegin vóru teir bestu súkklararnir í Føroyum við, so millum teir kundi kappingin álíkavæl gerast góð.

Av Toftum til Funnings fylgdust súkklararnir. Men í brekkuni niðan á Eiðisskarð hildu Guðmundur Joensen og Torkil Veyhe eina so mikið høga ferð, at Sverri Mohr Edvinsson ikki kláraði at fylgja við. Longri uppi í brekkuni kláraði Gunnar Dahl-Olsen heldur ikki at halda hesum báðu ungu súkklarunum.

Komnir niður av Eiðisskarði, súkklaðu Guðmundur og Torkil undan Gunnari, men í Hósvík hevði Gunnar súkkla teir inn aftur. Í brekkuni niðan úr Hósvík kláraðu Guðmundur og Gunnar at rykkja seg leysar frá Torkil.

Torkil Veyhe, sum helst er sterkasti súkklarin í Føroyum, var tá so illa á holdum komin av ringa veðrinum, at hann sjálvboðin valdi at gevast. Guðmundur og Gunnar fylgdust víðari niðan á Oyggjarvegin og til Havnar.

Á Oyggjarvegnum var veðrið sera vánaligt. Nógv regn og vindur, við hvøssum hvirlum. Tað einu løtuna fingu Guðmundur og Gunnar eina so mikið harða kvirlu á seg, at teir vóru sendir í leysum lofti eftir vegnum. Báðir duttu, teir fingu tó ikki álvarsligt mein, men súkklaðu víðari.

Tað gjørdist ein endaspurtur millum Guðmund og Gunnar, sum Gunnar vann, harvið bleiv Gunnar Dahl-Olsen, sum nú er 43 ár, aftur føroyameistari í landavegssúkkling.

Sverri, sum súkklaði meginpartin einsamallur, mátti fáa hjálp á Oyggjarvegnum. Ein bilur koyrdi við síðuna av Sverra har sum hvirlurnar vóru ringast, á henda hátt slapp Sverri undan teimum ringastu hvirlunum á Norðadalsskarið. Sverri gjørdist sostatt nummar trý í kappingini.



*Veðrið var ikki tespiligt, men kortini stríddu Gunnar Dahl-Olsen og Gudmundur Joensen seg til Havnar, har tað tó eydnaðist Gunnari at spurta seg til gullið*